Fra: Rannvá Sólheim
Til: Umhvørvismálaráðið
Emne: VS: Hoyringssvar - broyting í elveitingarlógini
Dato: 19. januar 2024 15:04:08
Vedhæftede filer: image001.png

Til Umhvørvismálaráðið,

Hoyringssvar

Viðvíkjandi "Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni"

Við uppskotinum verður søla av el frameftir skipað sum heilsøla og smásøla. SEV verður ikki longur einaseljari av el í smásølu, tí onnur sølufeløg kunnu við góðkenning bjóða seg fram at selja el og orkutænastur. Hetta kann verða ein fyrimunur fyri kundan, men tað er sera týdningarmikið, at greiðar reglur verða á økinum, soleiðis, at kundin kann handla á einum tryggum og gjøgnumskygdum marknaði.

Í Danmark er el-økið fult liberaliserað, so støðan verður ikki heilt tann sama í Føroyum, við hesum uppskoti. Men Brúkaraumboðið metir tó, at fleiri av avbjóðingunum, sum vit síggja í Danmark, kunnu koma til Føroyar eisini.
Vísast kann á, at danska brúkaraumboðið hevur sera nógv mál viðvíkjandi marknaðarføring á el-økinum. Í 2022 fekk danska brúkaraumboðið 563 klagur um elfeløg, og árini frammanundan hevur talið ligið um 700 um árið. Klagurnar snúgva seg í høvuðsheitum um ólógliga telefonsølu, manglandi útgreining av elrokningini, manglandi atgongd til upplýsingar um nýtslu og prísir, kundar fáa ikki afturgoldið pening, sum teir hava tilgóðar, broytingar í avtalutreytum og trupulleikar hjá kundum at uppsiga avtalur.
Hetta eru mál millum søluliðið og kundan, og tí er tað ikki ósannlíkt, at vit eisini fara at møta hesum avbjóðingum.

Tað er tískil sera umráðandi, at brúkarin verður væl vardur. Hetta meta vit ikki, at uppskotið leggur upp til, í nóg stóran mun.

Ítøkiliga vil Brúkaraumboðið serliga vísa á hetta:

Í pkt. 1.4. Samandráttur av uppskotinum stendur m.a. soleiðis:
"*Nýskipanin í reglunum er, at krav verður sett til gjøgnumskygnið í ásetan av elprísinum, so at kundin sær júst hvussu elprísurin er samansettur, hvørji gjøld eru fyri skipanarberandi tænastur, umsitingar- og tænastugjøld o.s.fr. Upplýsingar skulu skilmarkast á rokningini til kundan. Eisini skal útlátið av CO2 sjónliggerast í fakturum mótvegis kundunum.*"

Og í serligu viðmerkingunum til § 1, nr. 16, stendur m.a. soleiðis viðv. § 15 h:
"*Krøv verða eisini sett til útgreining av elrokningini til kundaskaran, heruppií hvussu stórt útlátið av CO2 er knýtt at elveitingini. Hetta fyri at økja tilvitið um burðadygga elframleiðslu og elnýtslu. Felag, sum selur el, skal útgreina kostnaðin fyri elveitingina. Útgreiningin skal í minsta lagi fevna um kostnað fyri framleiðslu, flutning av el, yvirlit yvir gjøld fyri skipanarberandi tænastur umframt aðrar tænastur knýttar at elveitingini. SEV greinar og skilmarkar støðugt sínar prísir fyri ymiskar veitingar og tænastur í elskipanini.*"

Hetta ljóðar gott, men Brúkaraumboðið dugir ikki at síggja, at hesi krøv til útgreining samsvara við lógartekstin (§ 15 h).
Í § 15 h stendur bert, at sølufeløg skulu áseta smásøluprísir fyri sølu av el og kunnu áseta prís fyri tænastur knýttar at sølu av el. Harafturat er ásett, at landsstýrisfólkið kann í kunngerð áseta nærri treytir fyri at góðkenna sølufeløg, heruppi í CO2 sporførið, og meginreglur fyri ásetan av avsláttarprísum.

Krøvini til útgreining eru ikki sett inn í sjálvan lógartekstin, og vit meta tað vera sera ivasamt um kunngerðarheimildin røkkur til at áseta tað, sum viðmerkingarnar leggja upp til.

Vísast skal tó á, at í kapittul 3 a, sum fevnir um fjarhitavirksemi, er ein greiðari áseting í § 15 c, stk. 2. Mælt verður til, at seta eina líknandi áseting inn í § 15 h, soleiðis, at landsstýrisfólkið fær eina greiða heimild til at áseta reglur til gagns fyri brúkaran.

Blíðar heilsanir

Rannvá Sólheim
Stjóri

Skálatrøð 20, Postrúm 73, 110 Tórshavn.
Tel. +298 358000, www.bruk.fo